# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. august 2023 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Ummælistíð: | 3.-31august 2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum**
(Kravið um nýtt felag til hvørja einstaka framleiðslu verður strikað, og Filmshúsinum verður álagt at lata landsstýrismanninum frágreiðing frá virkseminum farna árið)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 170 frá 20. desember 2017 um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum, sum broytt við løgtingslóg nr. 62 frá 22. mai 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 1, stk. 3, verður sett:
“*Stk. 4.* Filmshúsið skal í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári lata landsstýrismanninum eina frágreiðing um virksemi í undanfarna álmanakkaári.”

**2.** § 4, stk. 2, verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Felagið hevur ábyrgdina av, at framleiðslan verður framd í Føroyum, og at ein verkætlanarroknskapur verður gjørdur fyri ta einstøku framleiðsluna. Verkætlanarroknskapurin skal vísa allar útreiðslur, sum afturberingin viðvíkur, og útreiðslurnar skulu bókast í felagnum.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
**1.1. Orsakir til uppskotið**
Filmsvinnan, TAKS og grannskoðarar, sum fáast við roknskap fyri filmsframleiðslu, hava víst á, at kravið um, at nýtt felag skal stovnast til hvørja einstaka framleiðslu, er óneyðugt og tungt at fáast við.

Afturat hesum hevur Løgtingsins vinnunevnd – í sambandi við viðgerðina av løgtingsmáli nr. 95/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum – heitt á landsstýrismannin um at áseta, at Filmshúsið á hvørjum ári skal lata gera frágreiðing frá virkseminum undanfarna ár.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum ásetur, at afturbering av útreiðslum fyri filmsframleiðslu í Føroyum verður bara veitt føroyskum partafelag ella smápartafelag, sum er stovnað til ta ítøkiligu framleiðsluna, sum afturberingin viðvíkur.

Hetta kravið varð grundað á, at tað var hildið neyðugt at hava eftirlit við, at stuðul ikki varð veittur av órøttum, og at tað var lættari at tryggja eftirlit og grannskoðan, um hvør einstøk framleiðsla var fram í einum felag, sum varð stovnað til endamálið.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at gera afturberingina fyri útreiðslur til filmsframleiðslu í Føroyum einfaldari. Mett verður, at sama endamál um eftirlit og grannskoðan kann røkkast við einum verkætlanarroknskapi, og kravið um nýtt felag til hvørja einstaka framleiðslu verður tí strikað.

Enn sum áður verður kortini kravt, at afturbering bara kann latast føroyskum partafelag ella smápartafelag.

Lógaruppskotið hevur somuleiðis til endamáls at áseta, at Filmshúsið á hvørjum ár skal lata gera frágreiðing frá virkseminum undanfarna ár.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Víst verður til pkt. 1.3 *Endamálið við uppskotinum.*

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Filmshúsinum og Felagnum Føroysk Filmsfólk.

Lógaruppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 3.-31. august 2023.

Víst verður til hjálagda upprit um innkomin hoyringarsvar [verður skrivað, tá hoyringarfreistin er farin]

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**
**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Fyri landið hevur lógaruppskotið ta umsitingarligu avleiðing, at Filmshúsið, aftur at øðrum uppgávum, eisini skal lata landsstýrismanninum eina frágreiðing um virksemi í undanfarna ári. Mett verður kortini, at vavið á hesi uppgávu rúmast innan fyri verandi umsitingarorku.

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið verður mett at hava positivar avleiðingar fyri vinnuna, bæði fíggjarliga og umsitingarliga.

Bæði umsitingarliga og fíggjarliga er tað ein fyrimunur fyri vinnuna, at tað ikki longur er neyðugt at stovna nýtt felag til hvørja einstaka framleiðslu.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørlse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum,. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, eins og lógaruppskotið ikki verður mett at gera onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella til kommununar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**
***Til § 1, nr. 1***
Ásett verður, at Filmshúsið á hvørjum ári skal gera eina frágreiðing frá virkseminum undanfarna ár. Frágreiðing skal latast landsstýrismanninum í seinasta lagi 1. februar.

***Til § 1, nr. 2***
Kravið um, at nýtt partafelag ella smápartafelag skal stovnast til hvørja einstaka framleiðslu, sum fær afturbering fyri útreiðslur til filmsframleiðslu í Føroyum, er strikað. Í staðin skulu umsøkjarar gera ein verkætlanarroknskap, sum greidliga sýnir allar útreiðslur, sum eru hildnar í Føroyum. Allar útreiðslurnar skulu bókast í felagnum.

***Til § 2***
Gildiskomuáseting. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá...
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá...